# Natúrligur tørvur at prýða

AT SKULA **PRÝÐA** EIN BYGNING Í BÝAR- OG **BYGDARUMHVØRVINUM**, ER EIN STÓR **ÁVBJÓÐING** FYRI EITT LISTAFÓLK. TÁ P**RÝÐINGIN** SKAL VERA EIN PARTUR AV SJÁLVUM **BYGNINGINUM**, ER AVBJÓÐINGIN SERLIGA STÓR, SKRIVAR **HANSINA IVERSEN** Í HESI GREIN UM LIST Í **ALMENNA** RÚMINUM



**LIST Í ALMENNA RÚMINUM**

Hansina Iversen

Tá eg gekk í Kommunuskúlanum í Havn, var eg bergtikin av stóra málninginum hjá Williami Heinesen av Sjúrði í bardaga við ormin, sum prýður veggin eystureftir í auluni. Aulan var prýdd við myndarøð úr Sjúrðakvæðunum; men stóra listaverkið eystureftir, var tað ið altíð sást, tí har fyri framman var pallurin og orglið úti í horninum til vinstru. Aulan hevði ikki verið tann vakra og stórbæra høll hon er, uttan listaverkini hjá Williami Heinesen. Listaverkini eru tíbetur varðveit og gera høllina til eitt einastandandi rúm at vera í.

Tá nýggja Hotel Føroyar lat up í 1983 uppi á Oyggjarvegnum, var hotellið prýtt við dygdarlist av fremstu listafólkum í Føroyum, m.o Tróndur Patursson í forhøllini, Bárður Jákupsson í matstovuni og Zacharias Heinesen í veitsluhøllini.

Zacharias Heinesen hevði prýtt skilaveggirnar í veitsluhøllini, sum kundu breiðast út og leggjast saman aftur, alt eftir hvussu stórt rúm veitslur høvdu brúk fyri. Zacharias hevði gjørt hesar veggir so serstaka vakrar, at hendan annars sera ómerkiliga høll, varð til eina tindrandi høll, við teimum skipaðu brotunum í klárum litum, málað á hvítu veggirnar. Tá hotellið í nítiárunum kom í hendurnar á nýggjum eigarum, og bleiv Hotel Borg, rullaðu tey deyða ljósareyða plastmáling yvir lívligu veggirnar, fyri at tekkjast stokkuta mótanum, sum ráddi tá. Høllin misti sína tign. Syrgiligt!

Í dag eru tíbetur aftur nýggir eigarar, ið duga at síggja virðið í serliga bygninginum og týdningin av at prýða hann við skili. Men listaverkið hjá Zachariasi Heinesen kann ikki gerast aftur.

At skula prýða ein bygning í býar- og bygdarumhvørvinum, er ein stór avbjóðing fyri eitt listafólk.

Tá prýðingin skal vera ein partur av sjálvum bygninginum, er avbjóðingin serliga stór.

Tá eg byrjaði arbeiðið, at prýða gamla telefonhúsið á Tinghúsvegnum, sum skuldi umbyggjast til umsiting løgtingsins, var stórsta avbjóðingin, at vera partur av stórari verkætlan, har tíðarætlanin var stýrd av fleiri samstøðupørtum. Bíðitíð, avlýsingar, seinkingar og framskundan, vóru allatíðina partur av arbeiðsgongdini og tað var torført at finna út av, hvussu tíðin kundi nýtast best. Alt ið einum bleiv okkurt framskundað, og so var ikki annað at gera enn at vera til reiðar við tí, sum skuldi setast upp tá, og var tað nú nóg gott? Í øllum hesum órógvandi broytingunum á einum byggiplássi, roynur listafólkið at finna eina javnvág.

Alt tað praktiska, at halda kostnaðarætlanina, at møguliga skula broyta tilfarið, sum umleið broytir útrykkið, sum eg so aftur skal taka støðu til. Tilfarið skal kunna halda til veður og vind, litir og formar skulu haldast óbroyttir í krevjandi umstøðum.

Í uppgávuni hugsaði eg um prýðingina á sama hátt, sum eg vanliga arbeiði við mínum málningum. Men kanska er styrkin í verkinum júst tann, at farið verður undir at skapa eitt listaverk, og ikki eitt snið. Listaverkið er uttan fyrilit og úti av dimensiónum í mun til umhvørvið, meðan ein bygningur verður hugsaður at standa í samljóði við umhvørvið hann stendur í. So í veruleikanum standa bygningurin og listin í andstøðu, og skapa ein dynamikk, ið er avgerandi fyri tílíkt samstarv og fyri úrslitið.

Á ráðstevnuni, sum verður hildin í Norðurlandahúsinum 29.apríl, verður óiva kjak um týdningin av at prýða bygningar og um tað yvirhøvur er neyðugt, - og skulu vit brúka pening til tað?

Sjálvandi haldi eg tað vera alneyðugt, og at tað nú er tikið stig til at taka hetta áhugaverda evni fram á ráðstevnuni " Millum Kongaminnið og kitsch", gleðir meg. Vit hava ein náttúrligan tørv á at prýða; men í almenna rúminum er tað umráðandi, at hetta verður umsitið væl.

Tað kann ikki vera nakar ivi um, at tað mugu vera serkøn á listarliga økinum, ið skulu gera tað. Tað krevst ein vitan og eitt innlit í myndlist til at kunna meta um, hvat er nóg gott.

Hugsið tykkum Gøtu kirkju - stílfull byggilist og vill myndlist saman. Hevði henda kirkjan verið eitt serligt verk, um tað eina av hesum ikki var?





